framleiðarin og ljóðblandarin Tommy Hansen hevur fingið tað allar besta burtur úr Sic, har er stutt sagt einki at finnast at. Bólkurin hevur á konsertum sera ofta verið fyri óhepnum ljóðblandi, av tí at vanligi føroyski ljóðmaðurin ikki hevur nóg gott innlit í hetta slagið av tónleiki, tí er tað ein frægd at hoyra bólkin, júst soleiðis sum hann eigur at ljóða.

Eg noyðist líka at nevni trummuspælið. Tað er øgiliga gleðiligt at hoyra hvussu væl Magnus spælir á trummurnar, eftir at hann varð ljóðblandaður burtur í einki á Transcend hjá Makrel. Her er talan um ein av okkara frægu rokktrummuleikarum.

### Pakkað inn á grikskum

Fløguhúsan hevur grikski sniðgevin Seth gjørt. Seth er hóast síni einans 34 ár sera royndur innanfyri sniðgeving og hevur gjørt húsar til nógv av stóru nøvnunum á altjóða harða rokkpallinum. Hann hevur eisini áður gjørt ein føroyskan fløguhúsa, Transcend hjá Makrel. Hesin húsin stendur einki aftan fyri tann hjá Makrel og stendur væl til tónleikin hjá Sic. Ein ordiliga flottur húsi.

### Djarvur bólkur

Limirnir í SIC vóru djarvir, tá teir kunngjørdu, at teirra fyrsta fløga fór at verða ein varði í føroyskum tónleiki. Men eftir at hava hoyrt hana, so er ikki trupult at síggja, hvar sjálvsálitið kemur frá, teir hava eitt framúrskarandi produkt.

Í sanginum My Hell syngur Mikkjal:

*Feels Like my soul*
*has left my body*
*I'm an empty bag*
*of bones*
*Now I'm just like*
*all the other*
*all the copies*
*end the clones*
*My Hell*

Eg kann bert staðfesta, Mikkjal, tú verður ongantíð sum hini, tú ert heilt serligur og Sic er ein heilt serligur bólkur, eitt sterkt navn. Við Pandemonium hevur SIC fløguna, ið kann gera bólkin til eitt sterkt altjóða navn.

Hon fær 5 av 6 møguligum stjørnum frá mær.




# Liv lívið – lat okkum føla pulsin

**Í februar mánaða var dagbóka-kapping á ungdómsportalinum www.eg.fo. Yvir 600 ung tóku lut í kappingini, og hvønn dag kom hópur av dagbókum inn, í morgin hósdagin verður vinnarin kunngjørdur.**

TÍÐINDASKRIV

– Vit á Eg.fo skipaðu fyri kappingini, tí vit vóru forvitin eftir at vita, hvussu ung í Føroyum liva lívið. Hvat gera tey? Hvat hugsa tey? Hvat droyma tey um? Vit vildu føla teirra puls, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.
Sambært Eg.fo, hevur arbeiði við at lesa tær innsendu dagbøkurnar verið rættuliga áhugavert, tí tær geva ein góða mynd av, hvat tað er at vera ung í Føroyum í 2007. Tey flestu, sum hava skrivað inn til kappingina, hava verið í aldrinum 14-17 ár, og tey lýsa, viðgera og hugleiða um tilveru og gerandisdag sín.
Kappingin er skipað í samstarvi millum Eg.fo og Suðuroyar Sparikassa, og hvønn dag í februar høvdu tey ungu møguleika at vinna Puls-kort á 500 kr frá Suðuroyar Sparikassa. Nú kappingin er at enda komin skulu høvuðsvinningarnar frá Suðuroyar Sparikassa handast. Høvuðsvinningarnir eru ávíkavist 10.000 kr, 3.000 kr og 2.000 kr.

### Vinnarin í kappingini avdúkaður

Í morgin hósdagin 15. mars kl.16.00 verður skipað fyri tiltaki í Suðuroyar Sparikassa, har avdúkað verður, hvør hevur vunnið og vinnandi dagbøkurnar verða lisnar upp.
- Kappingin gevur greiðar ábendingar um, at tað finnast skrivandi spírar millum ung í Føroyum, og vit vóna, at ein kapping sum henda kann eggja ungum at skriva enn meira, siga Eg.fo.

### G! kapping

Eg.fo vil fegin menna skapandi evnini millum ung í Føroyum, tí leggja kappingarnar á Eg.fo altíð upp til at verða skapandi. Mánadagin 12. mars fór nýggja kapping av bakkastokki, og enn einaferð er talan um ein spennandi kapping við feitum vinningum. Í samstarvi við G! Festival bjóðar eg.fo ungum at verða við í eini kapping, har tey skulu lýsa G! Festivalin
- Hvat rennir tær í hug ella merkir tú á tær, tá tú hugsar ella sigur orðið "G!"? Hvørji virði umboðar G! Festivalurin í tíni verð? Stutt sagt, hvat er G! Festivalurin fyri teg? Ger eina lýsing av, hvat tú heldur G! Festival vera - heilt eftir egnum høvdi, við tí miðli, tú heldur hóskar seg best. Tú velur mátan. Tað kann vera við ljóði, mynd/um, teksti, livandi ella stilt - júst soleiðis, sum tú kundi hugsað tær at lýst tað, verður sagt um nýggju kappingina.

Tað eru fýra undanumfør yvir tveir mánaðar, og tann besta, flottasta, stuttligasta og/ella mest kreativa lýsingin verður kunngjørd aðru hvørja viku.

### Vinningur fyri undanumførini er:

Eitt vikuskiftispass til G! Festival, ið er galdandi fyri allar festivaldagarnar. Um tað er hóskandi, verður lýsingin løgd út á G! heimasíðuna. Tey, ið vilja verið við í fyrsta lýsingarumfari, skulu senda lýsingina til eg@gfestival.fo í seinasta lagi fríggjadag 23. mars. Vinnarin av fyrsta umfari verður kunngjørdur mánadagin 26. mars.

### Høvuðsvinningurin

Tá ið undanumførini eru liðug, skal høvuðsvinnarin finnast í finaluni millum teir fýra semi-finalistarnar. Høvuðsvinningurin er afturat vinninginum fyri undanumfarið:
- Eitt tjaldingarpass til Føroya stuttligasta vikuskifti, G! Festival 2007
- Eitt stk G! merchandise, ið verður avtalað nærri, tá ið vinnarin er funnin
- Fløgu av einum bólki, sum framførir á G! Festival 2007

Um tað er hóskandi, kann tín lýsing av G! hugtakinum gerast partur av marknaðarføringini hjá G! Festival 2007.
- Tað verður væl lýst, at tú hevur vunnið, og tín lýsing verður í øllum føri løgd út á heimasíðuna hjá G! Festival.

### Eg.fo

Umframt spennandi kappingar er eisini nógv annað áhugavert at finna á ungdómsheimasíðuni Eg.fo. Til ber at lesa um evnir so sum sorg, kynslív, at skera í seg og happing. Tað ber eisini til at spyrja um ráð, um tú hevur ivamál ella trupuleikar - ung umæla filmar, fløgur og skriva um sítt lív. Á eg.fo er okkurt fyri øll ung, so legg leiðina framvið, sigur eg.fo at enda í tíðindaskrivinum.